Skrivað 11.03.2021

Hetta er 4 árið, at eg keypi elastikk til fimleikin, Dánjal Húsgarð, og Tilhaldið í Nólsoy og í Havn. Eg bílegði tey gjárkvøldið, og longu í morgun fekk eg boð um, at pakkin var á veg til Føroyar. Ein fantastiska góð og skjót service frá donsku fyritøkuni - og eg havi ikki eingang goldið fyri tey enn.
Fyrstu ferð, eg bílegði elastikk til Dánjal, var tí tey vóru útseld í eina evigheit í Havn. Aðru ferð var tað, tí tey enn ikki fingust í Havn. Triðju ferð var orsøkin nøkunlunda tann sama, umframt prísin, sum tá var 30 kr. fyri 1 elastikk.
Nú kostar 1 elastikk 50 kr. í Havn - tað vil siga, at prísurin er hækkaður frá 30 kr. til 50 kr. uppá 1 ár - ella umleið 80%.
Seinastu 3 árini, eg havi keypt elastikk til Dánjal, havi eg goldið sama prísin hvørt ár - umleið 6,32 kr. fyri hvørt elastikk, og 50 kr. í porto til Føroyar. Eg havi keypt 39 elastikk fyri knappar 300 kr.
Í ár er portoin frá DK hækkað til 84 kr., men nú gevur danska fyritøkan mær eyka rabat, so nú skal eg bara gjalda 6 kr. fyri hvørt elastikk. Danska fyritøkan veit, at eg keypi elastikk til okkara eldru, og eg haldi tað er so rørandi, at tey ynskja at veita ta allarbestu tænastuna til tey
E.S. Vanliga vil eg helst stuðla føroyskum fyritøkum, men tá eg við tveimum klikkum kann keypa 35 elastikk frá eini danskari fyritøku fyri 300 kr., sum annars vildu kosta 1755 í Havn, er vinningurin alt ov høgur hjá føroyska handlinum, og tí haldi eg fram við at velja donsku fyritøkuna framum, og vil framhaldandi gera tað.

